## Skuldu bumba oljuútgerð

Í Saudiarabia hava myndugleikarnir tikið meiri enn 100 menn, tí myndugleikarnir hava illgruna um, at menninir hava havt ætlanir um at søkja at landsins oljuútbúnaði. Ein talsmaður fyri innanríkisráðið sigur, at yvirgangsmenn hava lagt slíkar ætlanir fyrr, men at myndugleikarnir hava avdúkað tær. Eitt nú bleiv avdúkað, at yvirgangsmenn skuldu søkja at tí størsta oljureinsiverkinum í landinum. Av teimum meiri enn 100 monnunum, sum eru tiknir nú, eru 47 saudiarabar, og 51 eru úr Jemen.



## Bremsan loysnaði

Norska skaðanevndin er ikki liðug at kanna, hví 16 góðsvognar rullaðu við nógvari ferð ígjøgnum Oslo í gjár, til teir steðgaðu niðri við havnina. Tilburðurin kravdi trý mannalív. Fyribilskanningar vísa, at av einari ella aðrari orsøk loysnaði tann sokallaða sporbremsan, sum skuldi tryggja, at vognarnir ikki fóru nakran veg. Ístaðin fyri loysnaðu teir og rullaðu einar átta kilometrar oman ímóti havnini. Hildið verður, at ferðin hjá teimum leysu tokvognunum mundi vera um 100 kilometrar um tíman, tá hon var upp á tað mesta.

# Gekk væl at selja partabrøvini í Bakkafrost

**Bakkafrost hevur eftir skrásetingina á Oslo Børs fleiri enn túsund partaeigarar fevnandi um ein breiðan skara av altjóða og føroyskum íleggjarum**

VINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Tað gekk væl at selja partabrøv í P/f Bakkafrost í almennum útboði, nú felagið verður skrásett á Oslo Børs. Tað sigur Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost.

Sølukursurin verður 31 norskar krónur fyri hvørt partabrævi, sum er hægsti kursurin í vegleiðandi kursleguni á 27-31 norskar krónur. Partabrøvini hjá Bakkafrost verða ætlandi skrásett á Oslo Børs fríggjadagin 26. mars 2010.

Almenna útboðið var sett saman av 2.608.065 nýggjum partabrøvum, ið felagið seldi og 18.645.271 partabrøvum, ið verandi partaeigarar seldu. Útboðið varð sjey ferðir yvirteknað.

Søluupphæddin fyri nýggju partabrøvini, ið felagið seldi, svarar til 80,85 milliónir norskar krónur.

- Vit eru sera væl nøgd við móttøkuna, ið Bakkafrost hevur fingið frá íleggjarum seinastu vikurnar. Vit eru fegin um tann stóra áhugan, sum bæði føroyskir og altjóða íleggjarar hava víst felagnum, og hava góðar vónir fyri framtíð felagsins, sigur Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost.

Oslo Børs góðkendi gjár skrásetingina av Bakkafrost treytað av, at tað sambært minstukrøvunum á Oslo Børs eru nóg nógvir partaeigarar í felagnum, tá ið felagið verður skrásett.

Bakkafrost væntar, at hesar treytir eru uppfyltar, tá ið nýggju partarbrøvini eru innskrivað eftir ætlan 25. mars 2010. Felagið væntar, at partabrøvini í Bakkafrost verða skrásett á Oslo Børs í morgin.

Tá ið nú útboðið er liðugt, hevur Bakkafrost 48.858.065 partabrøv. Marknaðarvirðið av felagnum svarar til umleið 1,514 milliardir norskar krónur.

Bakkafrost hevur eftir skrásetingina fleiri enn túsund partaeigarar fevnandi um ein breiðan skara av altjóða og føroyskum íleggjarum.

Føroya Banki og Nordea Markets hava verið høvuðsráðgevar í samband við skrásetingina. Carnegie ASA hevur eisini virkað sum ráðgevi. Advokatskrivstovan og Wiersholm hava verið løgfrøðiligir ráðgevar hjá Bakkafrost.



# Flexlán ávirka prísirnar

**Verða vælumtóktu eitt-ára renturegulerings-lánini avtikin orsakað av strangari likviditetsreglum frá ES, verða bústaðarprísirnir í Keypmannahavn trýstir niður, tí tað fer at svara til eina rentuøking á tvey prosent**

FLEXLÁN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ávaringar frá Tjóðbankanum, Búskapar- og vinnumálaráðnum og Realkredittfeløgunum bera boð um, at vælumtóktu F1-lánini skjótt verða fortíð. Tað skrivar danska blaðið Børsen.

ES-kommissiónin arbeiðir í løtuni við einum lógaruppskoti, sum við herdum likviditetskrøvum fara at taka lívið av serligu donsku flexlánunum, har rentan verður tillagað einaferð um árið.

Hendir tað, verða bústaðarprísirnir settir undir trýst. Útrokningar, sum ráðgevingarfyritøkan, PA Consulting, hevur gjørt fyri Børsen, vísa, at bústaðarmarknaðurin í Keypmannahavn fer at líða undir, um tey stuttfreistaðu flexlánini útfasast frá 2013.

Framrokningar hjá PA Consulting vísa, at ein útfasing av flexlánunum, sum í fyrsta lagi kann byrja í 2013, fer at bumba bústaðarprísirnar 18 ár aftur í tíðina.

Útrokningar vísa, at í 2018 fer fermetraprísurin í Keypmannahavn at vera 15.000 krónur, og tað er eitt støði, sum seinast er upplivað í 2000, og sum er munandi lægri enn verandi fermetraprísir á 22.400 krónur.

Talan fer at verða um eina príslækking, sum ikki fer at ganga upp eftir aftur fyrr enn um fimm ár.

Sambært PA Consulting fer ein avtøka av F1-lánunum at merkja eina rentuøking á tvy prosent, og frá 2013 fer tað at taka bústaðarprísunum 12 ár at koma upp á sama støði, sum tei eru á í dag.



*Meðal fermetraprísurin á bústøðum í Keypmanahavn fer at lækka munandi, verða vælumtóktu flexlánini avtikin*

### Trýstir bústaðarprísir

Í sínum metingum roknar PA Consulting við, at rentustøðið liggur á trimum prosentum, og at arbeiðsloysið liggur á fýra prosentum.

Ein avtøka av flexlánunum fer tískil at føra við sær eitt fleiri ára langa bústaðarmarru og merkja eitt økt trýst á bústaðareigarar.

Ein serfrøðingur í bústaðarbúskapi, Morten Skat, lektor við Syddansk Universitet, metir eisini eina lækkandi bústaðarkurvu, um F1-lánini verða avtikin.

- Tað fer alt annað líka at draga bústaðarprísirnar niðureftir. Verður tað dýrari at hava eitt bústaðarlán soleiðis, sum lagt er upp til við nýggju reglunum, fer hetta at trýsta bústaðarprísirnar niður, sigur hann.

- Og tað verður upp aftur verri, um nýggju reglarnir koma samstundis sum rentan hækkar, tí tá verða prísirnir trýstir frá tveimum síðum samstundis. Men tað er eisini tengt at, hvussu arbeiðsloysisstøðið skikkar sær, sigur Morten Skat við Børsen.

Í Føroyum verða flexlán ikki veitt, og tí er ógvuliga ivasamt, um gongdin á danska bústaðarmarknaðinum hevur nakra ávirkan her heima.